

# Símun Hammer: Faroexpo gekk óføra væl

**Jógvan Hugo Gardar**

27.10.2014 - 08:56

Oljan.fo

Árliga Faroexpo-stevnan er av á hesum sinni, og fyrireikararnir kunnu taka saman um. Símun Hammer, ið stendur fyri samskipanini av stevnuni letur væl at.

- Faroexpo gekk óføra væl. Tað serliga í ár var sjálvandi at Bakkafrost nýtti Faroexpo sum høvi til at skriva undir við ymiskar veitarar um bygging av nýggju framleiðslueindunum á Glyvrum, sigur hann.

Símun Hammer heldur at serliga ein partur av stevnuni riggaði serliga væl í ár.

- Ráðstevnan í Løkshøll, har evnið var: 'Hvussu stýra tey bestu feløgini' var sera áhugaverd. Fyrilestrarnir suppleraðu sera væl hvønn annan, og góðu hvør í sínum lagi gott innlit í hvørji viðurskifti hava serligan týdning fyri at teljast millum tey fremstu, sigur Símun Hammer.

Olja- og fráandavinnan hevur seinu árini havt sítt natúrliga pláss í kjakinum á Skálafjørðinum.

- Olju- og frálandaspurningurin var ikki ein høvuðsspuningur á messuni hesuferð, men hetta er ein nátúrligur partur av Faroexpo hvørt ár, tí tað altíð eru nøkur feløg innan hetta vinnuøki, sum luttaka á Faroexpo, sigur ein nøgdur Símun Hammer.